Ár 2005, hin 20. september

Ár 2005, hin 20. sept. kl. 17.30 hevði Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá, og har fylgjandi samtyktir vórðu gjørdar.

Allir limir á fundi uttan Hans Arne Bertholdsen.

Mál nr. 130.
Framtíðarviðurskifti við SEV.
Fíggjarnevndin beinir málið í Býráðið til umrøðu.

Samtykt býráðsins:
Eftir umrøðu varð samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

131.
Hegn á Norðoyri.
Víst verður til býráðsmál nr. 109, tann 21.juni 2005.
Umsitingin hevur saman við borgarstjóranum umrøtt fíggjarviðurskiftini í smb. við málið um býarhegn á Norðoyri, tí býráðslimir skiltu býráðsfundin soleiðis, at umsitingin skuldi finna pengarnar innan fyri tað tekniska økið, og at hegnið kring Oyrarbygd tískil skal setast upp í summar. T.U. staðfestir, at talan er um eitt íløguarbeiði, sum umsitingin ikki kennir endaliga kostnaðin av, men verður mett, at upphæddin verður niðan fyri Kr 600.000. Sí skriv frá T.U. við broytingum av fíggjarætlanini fyri 2005, og at Kr 600.000 verða fluttar til byggibúning ella býarfríðkan at nýta til samlaðan kostnað av býarhegni á Norðoyri.

Tekniska nevnd tekur undir við notatinum, dagf. 25.07.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 06.09.05, og at arbeiðið verður framt sum skjótast.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

132.
Viðv. siglingarrennuni á Vestursíðuni og umvæling av múri og botnsikring.
Vísandi til kanningina av vestaru bryggju, sum LBF gjørdi fyri kommununa í 2004, verður biðið um heimild til at fyrireika eitt neyðugt umvælingar-, botnsikringar- og møguligt dýpingararbeiði. Orsøkin er, at møguleiki skuldi verið fyri at fingið eitt rímiligt tilboð nú, tí útgerð helst er tøk til arbeiðið.
Sí skriv frá T.U. 04.09.05.

Havnanevndin tekur undir við skrivi frá T.U. dagf.04.09.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini 06.09.05.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

133.
Uppsøgn av leigusáttmála – Strandferðslan.
Sí skriv frá Strandfaraskip Landsins, dagf. 30.06.05.

Málið hevur verið til kunning í Havnanevndini.

Málið hevur verið til kunning í Fíggjarnevndini. Samstundis minnir nevndin á málið um plasering og fremjan av móttøku fyri býin í sambandi við Norðoyatunnilin. Nevndin mælir frá, at partur av strandferðslubygninginum verður leigaður út.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

134.
Linjuføring av vegi uttan fyri Norðoyri.
Í samband við eitt mál, sum hevur tikið seg upp við vegastrekki frá gl. bygdini á Norðoyri og úteftir, hevur T.U. hjálagt eina plántekning um, hvussu linjuføringin eigur at vera á hesum strekki. Kommunan hevur ætlanir um at gera eina útstykking uttan fyri uttastu útstykkingina, og verður tað tí neyðugt at breiðka verandi veg. Sí

skriv frá T.U. Mælt verður til, at góðtaka plántekningina. Við tað, at vegurin nú verður lagdur út sum 10m breiður, verður somuleiðis mælt til, at býráðið ognar sær írestandi lendi til vegin, og at breiðkingararbeiðið verður sett á arbeiðir yvir komandi fíggjarætlan.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 28.09.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 06.09.05.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

135.
Keyp av dumpara og arbeiðsbili.
Vísandi til ársfrágreiðingar og til fleiri skriv frá grótbrotinum viðv. dumpara og arbeiðsbili verður hervið biðið um heimild til at útvega nevndu arbeiðstól og at gjalda hesi av upphæddini í grunni og av avlopinum hjá grótbrotinum, sum tilsamans er mett at vera einar 1,5 mill. kr. Sí skriv frá T.U.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 04.09.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við, at dumparin verður keyptur fyri Kr 900.000,-. Viðv. arbeiðsbili mælir nevndin til, at hann verður keyptur so bíliga sum til ber. Samstundis heitir nevndin á TU um at taka upp til viðgerðar bilparkina hjá kommununi við tí fyri eyga at hava ein so rationellan rakstur sum møguligt.

Samtykt býráðsins:
Málið beint aftur í Teknisku Nevnd til viðgerð av fíggjarliga partinum.

136.
2005-21-002 bilverja í Árnafirði.
Hjáløgd er ein uppseting yvir, hvat ein bilverja við niðaru vegsíðu á vegastrekkinum frá húsunum hjá Jógvan S.Joensen og áleið 190m yvireftir móti seyðahúsinum hjá A. Sólheyg, kostar.
Hjálagt er eisini ein tekning, sum sýnir, hvar omanfyri nevnda bilverja er.

Á fundi tann 09.03.05 tekur Tekniska nevnd undir við skrivi frá T.U. 27.01.05 og beinir málið í Árnafjarðarnevndina.

Árnafj.nevndin tekur undir við málinum.

Á fundi tann 06.09.05 sigur Tekniska nevnd, at málið er liðugt viðgjørt av nevndini.

Málið hevur verið til kunning í Fíggjarnevndini.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

137.
2005-12-036 Barnaansing – útreiðslur vegna vantandi barnaansing.
Sí viðmerkingar frá roknskaparleiðaranum um stuðulin , sum goldin verður foreldrum vegna vantandi barnaansing, og spurningin um at økja um talið av ansingarplássum. Tað er Almannastovan, sum í fyrstu atløgu rindar útreiðslurnar til foreldrini, men krevur tær so innaftur gjøgnum skattaavrokningina. Uppgerðin omanfyri yvir útreiðslurnar til nýggjan barnaansingarstovn vísir, at við nevndu fyritreytum er mest sannlíkt, at ein øking í talinum av ansingarplássum gevur kommununi eitt hall, peningaliga sæð, og tí loysir tað seg ikki fíggjarliga at økja um tali av ansingarplássum. Tí verður mælt til, at Býráðið tekur barnaansingarmálið upp til umrøðu í einum breiðum høpi, har aðrir spurningar eisini verður umrøddir t.d. vinnulív, kvalitetur, bíðilistar, eindarprísir og systkinaavsláttur.

Vísandi til skriv frá umsitingini, dagf. 30.08.05 hevur Sosiala nevnd samtykt, at kommunan prioriterar at loysa barnaansingartørvin í kommununi.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu nevnd 14.09.05.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið frá Sosialu Nevnd og Fíggjarnevndini samtykt.

138.
2005-12-035 Sambýlið – kommununnar partur av útreiðslum.
Í 2004 samtykti upptøkunevndin fyri eldrarøktina í Norðoyggjum , at ein borgari av Viðareiði skuldi sleppa inn á

Sambýlið á Heygnum, og í hesum sambandi hevur kommunan sent rokning til Viðareiðis kommunu. Gingið varð út frá, at allar kommunur í Norðoyggjum hava góðtikið gjaldið, men nú vísir tað seg, at Viðareiðis kommuna ikki vil gjalda, tí hon metir hetta at vera eina landsuppgávu, og eigur rokningin tí at sendast til lands-myndugleikarnar. Av tí, at bókhaldið ikki kemur víðari við hesum máli, verður tað sent til nevnd til umrøðu og støðutakan. Sí skriv frá roknskaparleiðaranum.

Sosiala nevnd hevur samtykt, at fastar mannagongdir verða fyri kommununar í samband við upptøku av eldri fólki aðra staðni enn í Klaksvíkar Kommunu. Upptøkunevndin má kunnast um hetta. Nevndin hevur somuleiðis samtykt at taka fund við Viðareiðis kommunu.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu nevnd 14.09.05.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

139.
Umsókn um sundurbýti matr. 783d
Umsóknin er í tráð við fyriliggjandi útstykkingarætlan, og mælir T.U. til at játta.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. 04.09.05.

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

140.
Umsókn um marknaumskipan matr. 1058.
Talan er um smávegis reguleringar millum omanfyri nevndu ognir –T.U. mælir til at játta.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. 04.09.05

Samtykt býráðsins:
Tilmælið samtykt.

Fundur lokin